gult38 cyan38 magenta38 svart38



## TILTØK

**Gudstænastur Kristi himmalferðardag**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Hestur:* kl. 12, Heri Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum.
*Havnar kirkja:* kl. 11 Bjarni Bæk, talvan gongur fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.
*Nólsoyar kirkja:* kl. 12, talvan gongur fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.
*Kaldbaks kirkja:* kl. 12, talvan gongur fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.
*Hvannasund:* kl. 12,
*Viðareiði:* kl. 17, Elsa Funding, talvan gongur fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.
*Æðuvík:* kl. 11, talvan gongur í Nes prestagjaldi fyri ytri missión.
Talvan gongur í *Gøtu kirkju* Kristi Himmalferðardag fyri Ytru Missión hjá Kirkjuliga missiónsfelagnum.
*Eiði:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í *Eiðis* prestagjaldi fyri Føroysku heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum.
*Sumba:* kl. 12, E. Beder

**Havnar kirkja**
Matiné verður í Havnar kirkju leygardagin 26. mai kl. 11.30 við »Havnar Ungdómshornorkestri«. Leiðari: Kenneth Jones.

**Rhema, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Team frá Logos II luttaka. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Kvinnustevna 2001 frá 25.-27. mai »Gud skapti«. Kommandør Berit Ødegaard og major Turid Gamst. Fríggjadagin kl. 20 Stevnan verður sett, allar kvinnur eru vælkomnar. Leygardagin kl. 10 útferð. Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, kl. 13.30 sunnudagsskúli ella útferð, kl. 15.30 kvinnumøti, kl. 18 alment møti. Mánadagin kl. 17 skótar.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19 Teen Xtreme, einki ungdómsmøti verður í annaðkvøld vegna ungdómstiltak umborð á missiónsskipinum »Logos II«. Leygardagin kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jaocbsen, kl. 18 kvøldmøti, fólk av »Logos II« luttaka við talu og sangi, kl. 22 útimøti v/Meinigheitini í Hoyvík. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið**
Kr. Himmalferðardag kl. 18 YM-møti v/Ungdómsbólkinum.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jógvan Petersen, Manskórið syngur.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Hósdagin (Kristi Himmalsferð) hámessa í Mariukirkjuni kl. 11.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit og kl. 16 giftast í Mariukirkjuni Lucita Banzon, Kollafjørður og Sámal Jákup Sakarisson, Hattarvík.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Anders Baadsgaard Jensen í Mariukirkjuni. Eingin sunnudagsskúli verður.
Mánakvøldið kl. 19.30 heldur Anders Baadsgaard Jensen prestur, fyrilestur í Mariukirkjuni um Frans av Assisi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti hjá Mourits og Guðrun, Onnugøta 7. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin møti kl. 18.

**Nesvík**
Felagsmissiónsvikan heldur fram í kvøld (fríggjakvøldið) kl. 18.30 við bønarhaldi, kl. 19.30 møti við Ernst Hansen, streingjakór av Toftum syngur. Kl. 22.30 lovsangs- og vitniløta, cafébetur matur til keyps. Leygardagin kl. 18.30 bønarhald, kl. 19.30 møti við Magna, Niels Juul, Gulaki o.ø., Kirkjukórið í Vestmanna syngur, innsavnan. Kl. 22.30 gospelkonsert við ymiskum ungdómsbólkum, dramaframførsla, drekkamunnur aftaná.

**Filadelfia, Sundalagið**
Í dag kl. 16-17.30 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn, kl. 18-19 bønarmøti.

**Keldan, Skálafirði**
Kristi Himmalsferðardag kl. 11 morgunmøti við Jastrid og Paula Høj. Vón fyri framman, sum skuldi vera fríggjadagin er útsett, nærri verður lýst aftur í bløðunum. Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Jan Jacobsen. Sunnudagin kl. 17 møti við Eyðun Jacobsen, kl. 17 barnamøti. www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 06 bøn. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti. Fólk frá Logos II luttaka. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Bøgøtu 3, 25. mai kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður í missiónshúsinum á Tvøroyri fríggjakvøldið 25. mai kl. 21.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Vikuskiftismøti verða leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 við luttøku úr Hoyvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tvøroyri**
Møtirøð fyri øll í Trongisvágsskúla 26.-27. mai. Evni hesar dagarnar: Frælsi frá ótta. Leygardagin kl. 15, leygarkvøldið kl. 20 (ungdómur). Sunnudagin kl. 15, sunnukvøldið kl. 20. Talari: Ólavur Jacobsen.

**Betel, Vágur**
Kr. Himmalsferðardag kl. 18: Evangeliskur fundur.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 21. mai:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18. Vit baka. Kortspæl, telving og onnur spøl.
kl. 14-18 Tilm. til døgurðan og túrin mikudagin á tlf. 316491
*Týsdagin 22. mai:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Bandupptøka »I skole i Thorshavn«. William Heinesen, Uppl. Poul Reumert, Ásmundur W. Johannesen.
*Mikudagin 23. mai:*
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur oman í Gamla Bókhandilin
*Hósdagin 24. mai:*
**Stongt. Kristi Himmalsferðardagur.**
*Fríggjadagin 25. mai:*
Opið hús.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20–21.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373




gult39 cyan39 magenta39 svart39



## FILMSTEIGURIN

# Thirteen Days

Í trettan ómetaliga spennandi døgum í oktober í 1962 stóð heimurin á tromini til eina vanlukku. Allastaðni í heiminum bíðaðu fólk eftir avleiðingunum av einum ræðandi politiskum, diplomatiskum og hernaðarligum samanbresti, sum fór at hava við sær eitt oyðandi atomkríggj millum USA og Sovjetsamveldið.

Amerikansk eftirlitsflogfør høvdu varnast, at Sovjetsamveldið setti rakettir upp hjá Fidel Castro á Cuba, sum er nærmasta grannaland hjá USA. Hesa hóttan kundi USA ikki lata fara afturvið borðinum óátalað, og forsetin John F. Kennedy var noyddur at gera okkurt.

Tað endaði við, at hann setti eina blokadu í verk móti Cuba, so at fleiri rakettir ikki skuldu finna leiðina til Cuba. Í nøkur spennandi samdøgur helt heimurin andanum, til ovastin í Sovjet, Nikita Krustjov, gav boð um at taka rakettirnar niður aftur. Vandin fyri atomkríggi var av á hesum sinni.

Eingin fer til fulnar at kenna sannleikan um, hvat fór fram handan tær stongdu hurðarnar hesar trettan dagarnar í tí Hvíta Húsinum, men við at kanna allar keldurnar við upptøkum úr Hvíta Húsinum, frágreiðingum, CIA-dokumentum og samrøður við fólk, sum vóru við hesar dagarnar, hevur leikstjórin gjørt ein avbera spennandi film, um hvussu nær heimurin var við eitt atomkríggj.





**HAVNAR BIO**
Tlf. 3119 56




**Frumsýning**
Fríggjadagin 25.05. kl. $20^{15}$ Leygardagin 26.05. kl. $20^{15}$
Sunnudagin 27.05. kl. $19^{30}$

www.in.fo/havnarbio




Fríggjadagin 25.05. kl. $23^{15}$ Leygardagin 26.05. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 27.05. kl. $22^{30}$




**Frumsýning**
Fríggjadagin 25.05. kl. $22^{45}$ Leygardagin 26.05. kl. $22^{45}$
Sunnudagin 27.05. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 25.05. kl. $20^{30}$ Leygardagin 26.05. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 27.05. kl. $19^{45}$